VARPIÐ

Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Layout: Team 85
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

Fríggjadag 6. kl. 16.50



Pingu
Pingu fer at fiska. Hann fær fatur á einum stórum fiski, og fær hug at halda áfram. Hann hevur tó ikki eyguni at fiskinum, tá hann leggur hann frá sær…

Fríggjadag 6. kl. 19.00

Skothol
Harði løgreglumaðurin Boyd leitar eftir stolnum narkotika í harða umhvørvinum í Detroit. Steven Seagal hevur høvuðsleiklutin í filminum, sum hann sjálvur hevur leikstjórnað.

Fríggjadag 6. kl. 20.25

Okkara kokkar (8)
Kokkarnir skera ein hval upp, soleiðis, at teir fáa stykkir, at gera til búffar, eisini taka teir hjartað við. Teir fara síðani í studio, har teir gera hjartaragout, innbakaðan grindabúff við leyki og osti, eisini gera teir grindabúff ,har teir hava sós afturvið, sum er smakkað til við óli, leyki og bacon.

Fríggjadag 6. kl. 22.25

Love Hurts
Am. kærleiksfilmur frá 1991
Paul Weaver, sum nýliga er fráskildur, verður heldur enn ikki skakkur, tá ið hann í sambandi við brúdleypið hjá systrini Karen, kemur aftur til barndómsheimið. Umframt familjuna hittir hann eisini fyrrverandi konu sína Nancy við báðum børnunum sum hann ikki hevur sæð í fleiri mánaðir. Tann einasti, sum ikki er heima, er pápin, hann situr á ølklubba og drekkur.

Leygardag 7. kl. 12.10

Fótbóltur: Manchester Utd-Arsenal, beinleiðis Canal +
Enska kappingin tykist vera komin ávegis einum maktskifti. Manchester United var øll nitiárini sterkasta liðið í Onglandi, men nú tykist Arsenal at hava átikið sær hendan leiklutin. Heimadysturin á Old Trafford móti Arsenal er kanska seinasti møguleikin hjá Manchester United, um teir veruliga skulu gera seg galdandi í ár.

Leygardag 7. kl. 18.00

Hitler
Ein stórur partur í viljanum hjá Hitler at nýta makt til tess at veruleikagera síni sjónarmið vóru ríkisgóðkend hópmorð. Men tað kravdi eitt kríggj, um hetta skuldi lata seg gera.

Leygardag 7. kl. 19.00

Menn við æru
Carl ætlar sær at gerast djúphavskavari í marinuni, men hann noyðist alla tíðina at stríðast við ovasta sín, sum helst sá halaferðina á honum. Í høvuðsleiklutunum síggja vit Robert De Niro og Cuba Gooding.

Leygardag 7. kl. 20.00

SATSA 5. sending
Luttakarar: Elsa-Margith Davidsen, Sørvágur, Karl Leonsson, Argir og Ólavur Larsen, Fuglafjørður
Vertur í Satsa er Páll Danielsen

Sunnudag 8. kl. 18.00

Ellen McArthur
Ein tími saman við hesi óvanligu kvinnuni, sum bert 24 ára gomul gjørdist yngsta kvinnan í heiminum, sum einsamøll hevur siglt kring knøttin í seglbáti.

Sunnudag 8. kl. 19.40



Gu' ved, hvem der kysser dig nu
Filmleikstjórin Sam skuldi verið eydnuríkur. Hann hevur eitt gott starv, eini stór hús og er giftur vøkru svensku lærarinnuni Lauru. Men Sam er eisini øvundsjúkur. Somikið øvundsjúkur, at hetta fullkomuliga oyðileggur spælið hjá sær sjálvum, og – kanska – ger hetta eisini, at Laura fær sær ein annan.

Sunnudag 8. kl. 20.00

Sangskeiðið hjá Heimamissiónini
Á hvørjum ári síðani 1978 hevur Hin føroyska Heimamissiónin skipað fyri einum sangskeiði, har øll kunnu luttaka. Sjónvarpið var til staðar, tá konsertin eftir sangskeiðið varð framførd.

Sunnudag 8. kl. 20.00

In his life: The John Lennon story
Í 1957 keypti ein fátækur og ókendur John Lennon ein guitar fyri seks pund. 14. september í '99 varð sama instrument selt fyri 225.000 dollarar. Filmurin snýr seg um ungdómsár hansara og upp til stjórnuárini, har hann gjørdist ein av høvuðsmonnunum í einum av størstu og týdningarmestu tónleikabólkunum nakrantíð.

Mánadag 9. kl. 18.00

Cabin by the Lake
Amerikanskur spenningsfilmur frá 2000. Í høvuðsleiklutunum eru Judd Nelson, Hedy Burress og Michael Weatherly.

Mánadag 9. kl. 19.00

Skúlagáttin – Tekniski skúlin
Skúlagáttin - Tekniski skúlin
Tveir tekniskir skúlar eru í landinum, ein í Havn og ein í Klaksvík. Í sendingini "Skúlagáttin" hitta vit millum annað stjóran á Tekniska skúla í Havn, Egon Øregaard. Birgir Kruse leggur til rættis.

Mánadag 9. kl. 21.00

Morð uttan maka
Høvdið á einum lokalum embætismanni er framman fyri 13 ferðafólkum á bussleið 49 søkt niður í beton av trimum maskeraðum monnum. Og onkursvegna er Softly tann, sum fær ábyrgdina av at kanna morðið. Við í hesi sendini er millum annað Dawn French.

Mánadag 9. kl. 21.40

Coupling
Eitt frekt enskt svar upp á stuttleikasendingina Vinir. Soleiðis kanst tú helst siga um nógv róstu skemtisendingina, sum í fjør fekk sonevndur silvurrósuna sum besta sitcom í Montreux.

Týsdag 10. kl. 12.30

Vágatunnilin
Sjónvarpið fer at senda beinleiðis frá hátíðarhaldinum, nú fast samband verður um Vestmannasund. Práta verður verður eisini við fólk, sum av ymsum ávum hava verið uppi í arbeiðinum.

Mánadag 9. kl. 23.30



Søgur um tey livandi deyðu
Í norðara partinum av Kili er ein gomul søgn um eina barnamumiu

Mánadag 9. kl. 19.00

Quills
Amerikanskur Drama-filmur frá 200 við millum øðrum Geoffrey Rush, Kate Winslet og Joaquin Phoenix.

Mánadag 9. kl. 21.00

Stóra ævintýrið hjá O'Shea
Kjøtátarar. Komodovaranirnar eru av grammastu rovdjórunum í heiminum. Tær jagstra og eta hvat sum helst, deytt ella livandi. Men økið, sum tær búleikast á, er somikið avmarkað, at tær nú teljast á listanum yvir hótt djóraslag.

Mikudag 11. kl. 9.50

Mumien vender tilbage
Í hesum amerikanska actinævintýrinum síggja vit millum annað Brendan Fraser, Rachel Weisz og John Hannah.

Mikudag 11. kl. 16.40

Gyltir tímar
»Auken ella Nyrup«. Tað var spurningurin fyri 10 árum síðani. Her síggja vit ein samandrátt av tiltiknu kongressini í 1992. Kongressin sum seinni fekk heitið »kongamorðið«
Mynd: Gyldne Timer
Tina W. Munck er vertur í Gyldne Timer
Mynd: Bjarne Bergius Hermansen

Mikudag 11. kl. 19.00



Vánaligt selskap
Hin unga Delphine lærir meira stórlætnu Oliviu at kenna. Brádliga snýr lívið seg um vinir, tónleik og serstakliga dreingin, Laurent. Han vil flyta til Jamaica, men hann hevur ongar pengar, men fyri hansara skuld er Delphine til reiðar at gera alt.

Mikudag 11. kl. 20.00



Undan væðingini: Húsavík í søgu og søgn
Í bandasavninum eiga vit ikki so heilt fáar sendingar, har gomul fólk siga frá. Tað kann vera um pláss, tey eru góð við, ella um tilburðir tey minnast aftur á. Í hesi sendingini hitta vit tvey av hesum fólkunum og tey eru Hanus undir Leitinum og Súsanna Samuelsen í Húsavík.

Hósdag 12. kl. 19.00



Tríði veraldarbardagi
Ræðandi og aktuellur spenningsfilmur um ein yvirgangsmann, sum letur eina deyðiliga biologiska virus fara í umferð, og hetta skapar sjálvandi miklan ótta í USA. Filmurin varð gjørdur tveir mánaðir undan yvirgangsatsóknini tann 11. september og eftirfylgjandi hóttanirnar um miltbrands-bakteriuna.

Hósdag 12. kl. 21.10

The Island of Dr. Moreau
Amerikanskur science-ficiton filmur frá 1996. Við eru millum annað Marlon Brando, Val Kolmer og David Thewlis.

Hósdag 12. kl. 21.15

Hetjurnar frá 11. september
Hendan sending er ein heiðran til teir 343 sløkkiliðsmenninar, sum lótu lív undir terroratsóknunum á World Trade Center hin 11. september í fjør. Í fýra vikur fylgja vit gongdini á tveimum brandstøðum í New York.

Hósdag 12. kl. 22.30

Krimitímin: Eitt mál fyri Frost 1:2
Ein arbeiðsmaður á elverkinum doyr í einari løgnari vanlukku og sama dag verður heim hansara oyðilagt av ókendum gerningsmonnum. Er samband millum málini? Meðan Frost roynir at finna svarið endar enn eitt mál á borðinum hjá honum Ein løgreglumaður er avrættaður og okkurt bendir á, at onkur av starvsfeløgum hansara er brotsmaðurin.

Leygardag 7. kl. 10.10

Barnatímin
Leygarmorgun í desember verður leikurin um stjørnuna,ið hvarv aftur at hoyra. Tá fer Barnaútvarpið at senda allar partarnar aftur, sum hava verið at hoyrt í vikuni.

Mikudagur 6. kl. 07.15

Jólaløtan
Í Jólaløtuni mikumorgun verður tosað við Greytasleik og Kertustubba. Vit fregnast um, hvat jólamenn takast við, nú jólini eru í nánd.
Katrin og Kári leggja til rættis

Mikudagur 11. kl. 19.30

Fólk og frítíð
Í sendingini hesuferð skifta vit orð við Óla Steinberg, sum í mong hevur virkað sum trúboðari í Grønlandi. Eitt nú verður spurt, hví Óli valdi júst hesa lívsleið, hvussu tað er at virka sum trúboðari í Grønlandi, og hvussu tað er at ferðast á heimsins størstu oyggj, eins og nomið verður við jól og jólahald á kavakløddu oynni.
Gunnar Nolsøe leggur til rættis.

Hósdag 12. kl. 19.00

Tilvera: Trúboðari í Nigeria
Gestur í útvarpsstovuni er Kaja Lamhauge Babba, sum í mong ár hevur verið trúboðari í Nigeria. Hon er gift nigerianskum erkabiskupi, og eiga tey tríggjar synir. Kaja sigur frá einum øðrvísi lívi í hesum fjarskotna landi.
Armgarð Arge leggur til rættis

MORGUNLESTRAR
í ÚF 9. - 14. desember

Mánadagin 9. desember
nr. 90 Upp, gleðist allir, gleðist nú
nr. 349 Klokkan slær, tíðin fer

Týsdaging 10. desember
nr. 84 Lat hurðar upp, ger borglið breið
nr. 337 Guð havi lov, tí Harrans orð

Mikudagin 11. desember
nr. 87 Eitt er Harrans ár nú runnið
nr. 336 Kom, sannleiks andi, vitni ber

Hósdagin 12. desember
nr. 94 Min sál skal Guði prísa
nr. 335 O, Guð hav okkum við títt orð

Fríggjadagin 13. desember
nr. 153 So dýrdarrík er talan
nr. 333 Frið sum troyst í sakni her
Leygardagur 14. desember
nr. 320 Ger tað sindrið, tú kanst
nr. 332 Títt orð er, Guð, várt arvagóðs

Ítróttur
CNN
Leygardagin kl. 16.30
Vikunnar professionella golf

Canal + Blå
Leygardagin kl. 19.25
Fótbóltur: Seria A

TV2
Sunnudagin kl. 20.30
EM-hondbóltur: Danmark-Ukraina

TVDanmark1
Sunnudagin kl. 20.30
Fótbóltur: Bundesligan

Eurosport
Mánadagin kl. 0.00
WATTS

Canal +
Mánadagin kl. 4.00
Fótbóltur: Tottenham-West Brom.

Discovery
Týsdagin kl. 21.00
Loynidómar hjá Formula One 3

DR1
Týsdagin kl. 21.00
Hondbóltur: Skjern-GOG

Børn
Canal +
Fríggjadagin kl. 14.05
Peddersen og Findus -fín vitjan

BBC Prime
Leygardagin kl. 6.00
Smarteenies

Cartoon
Sunnudagin kl. 14.00
Laoratoríið hjá Dexter

TVDanmark2
Mánadagin kl. 18.45
Nissurnar-endaliga uppgerðin

Canal+ gul
Týsdagin kl. 12.00
Vegurin til el Dorado

TV2
Mikudagi nkl. 18.50
Jólini hjá brøðrunum Mortensen

DR1
Hósdagin kl. 16.05
Aladdin hjá Disney